Eldur í grundlógarnevndini frá byrjan

Á fyrsta tíðindafundi hjá nýggju grundlógarnevndini kom tað fram, at tað ikki verður sum at siga tað hjá nýsetta formanninum Jóan Paula Joensen at halda skil á teimum 16 limunum, sum nú hava eitt ár at smíða uppskot til føroyska grundlóg. Politiskt klandur og agg hevði við sær, at tíðindafundurin meira var at rokna sum ein valfundur heldur enn ein kunnandi fundur um kanska týdningarmiklasta mál í Føroyum hesa øldina

LEIF LAADAL

Tað verður ikki lætt hjá Jóan Paula Joensen at finna eitt felags stev í nýsettu grundlógarnevndini, men hetta skakar hann ikki. – Ein av orsøkunum til, at eg váttaði at verða formaður í grundlógarnevndini er júst tann serstøða, sum nevndin er í, tá ið hugsað verður um, at ymisk politisk sjónarmið skulu sameinast, sigur Jóan Pauli

Mynd: Alan

Í fyribils arbeiðssetninginum hjá grundlógarnevndini stendur at lesa, at nevndin eigur at finna útav, hvønn leiklut tey politiskt valdu umboðini skulu hava í teimum almennu hoyringunum, sum eiga at verða í sambandi við tað arbeiði, sum nevndin nú skal í holt við. Hetta skal gerast fyri at tryggja, at politikkararnir ikki leggja seg út í eitt partapolitiskt kjak, sum forðar almenninginum í at koma framat, sum tað stendur.

Orðini komu til skammar

Mikudagin var so fyrstu ferð, at almenningurin, sum hendan dagin varð umboðaður av limum frá almennu og privatu fjølmiðlunum, fekk høvi at hoyra eitt sindur um tað arbeiðið, sum grundlógarnevndin skal taka sær av. Orðini í fyribils arbeiðssetninginum komu so ruddiliga til skammar, tí frá byrjan var greitt, at politiskir undirtónar lurdu undir nærum hvørjum orði. Politisku umboðini hjá teimum flokkum, sum frá byrjan hava verið ímóti eini grundlógarnevnd, søgdu bart út, at talan var um stavnsbinding. Formaðurin í Javnaðarflokkinum skýrdi grundlógarnevndina fyri at vera skipaða við einum ávísum politiskum sikti av eini smalari samgongu. Við hesum metti hann, at grundlógarnevndin, við eini løgtingslóg í rygginum, ið krevur, at allir flokkar á tingi eru umboðaðir í nevndini, er ein beinleiðis partur í fulveldisætlanunum hjá sitandi samgongu. Ein ætlan, sum hann ivast størliga í hevur fullan stuðul hjá føroyska fólkinum.

Umboðið hjá Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen, segði, at flokkurin var ímóti fulveldisætlanunum, men ikki ímóti broytingum í ríkisfelagsskapinum, og hon ætlaði at fara undir arbeiðið í grundlógarnevndini við tí í hyggju, at varðveita donsku grundlógina í Føroyum.

Ikki lætt at finna stevið

Sum sæst, so verður tað ikki lætt hjá Jóan Paula Joensen at finna eitt felags stev í nevndini, men hetta skakar hann ikki.

– Ein av orsøkunum til, at eg váttaði at verða formaður í grundlógarnevndini, er júst tann serstøða, sum nevndin er í, tá ið hugsað verður um, at ymisk politisk sjónarmið skulu sameinast, segði Jóan Pauli.

Nývaldi formaðurin legði afturat, at hann væntaði, at allir limirnir í nevndini fóru at gera sítt arbeiði so gott sum til ber, uttan mun til, hvønn politiska flokk teir liða á.

Á fundinum vildi Jóannes Eidesgaard eisini hava at vita, hví hvørki Høgni Hoydal ella løgmaður Anfinn Kallsberg sótu í grundlógarnevndini. Høgni Hoydal greiddi formanninum í Javnaðarflokkinum frá, at hann ikki helt tað vera passandi at seta seg sjálvan í nevndina og legði afturat, at Helena Dam á Neystabø, sum situr í nevndini sum umboð fyri landsstýrið, arbeiddi við øllum teimum økjum, sum fara at hava áhuga í eini føroyskari grundlóg, so hesum vali sá hann ikki nakað skeivt í.

Andstøðuumboðið koyrdu hart á frá byrjan, og tað kom eisini fram á kunningarfundinum, at tað arbeiðið, sum grundlógarnevndin nú fer undir, møguliga verður til fánýtis. Bæði Jóannes Eidesgaard og Lisbeth Petersen søgdu, at tað ikki var forsvarligt at brúka so nógva orku uppá at fyrireika eina føroyska grundlóg, sum kanska ongantíð bleiv sett í gildi í Føroyum. Høgni Hoydal svaraði teimum, at sjálvt um uppskotið til føroyska grundlóg, sum skal liggja á borðinum um eitt ár, verður kolldømt av løgtingi og/ella fólkinum, so var hetta arbeiði slettis ikki spilt arbeiði, tí eitt hvørt land eigur at hugsa um teir mest grundleggjandi løgfrøðisligu spurningarnar í samfelagnum, og tá ið nevndin einaferð er liðug við sítt arbeiði, so eiga føroyingar eitt gott grundarlag at arbeiða út frá.

Allir flokkar taka undir við marknaavtaluni

Rætting:

Rætt skal vera rætt

Í greinini um føroysku semjuna í marknaðartrætuni við bretar, sum stóð á síðu trý í mikudagsblaðnum, skrivaðu vit, at føroyingar ikki fingu part í tí 8000 ferkilometrar stóra økinum, sum liggur millum Føroyar og Skotland (annað gráa øki). Hetta er ikki heilt rætt. Føroyar hava tryggjað sær rættin til undirgrundina í 16 % av hesum økinum. Bretar fáa sostatt 84 %. Bæði londini hava tó loyvi at fiska í øllum økinum.

Økið er rættiliga áhugavert, tí tað verður mett, at eisini her er rættiliga góður tjansur at finna olju ella gass í undirgrundini millum Føroyar og Bretland.

Leif

Fyrsta viðgerð av marknaavtaluni millum Føroyar og Bretland var í løgtinginum mikudagin. Allir flokkar taka undir við avtaluni, so eingin forðing er fyri, at partarnir skriva undir 18. mai í Havn

LEIF LAADAL

Ein felagsnevnari var í viðgerðini av marknaavtaluni millum bretar og føroyingar í løgtinginum mikudagin. Nógv heit og góð orð fullu um tey fólk, sum hava staðið fyri samráðingunum. Bólkurin av fólki, sum síðani 1991 miðvíst hevur arbeitt fram ímóti eini loysn uppá bæði undirgrundina og fiskin, fekk nógv flott orð við á vegnum. Árni Ólafson, sum hevur verið leiðari í føroysku samráðingarnevndini hesi seinastu árini, var drigin fram sum stóri strategurin, og nærum allir limir í løgtinginum, sum tóku orðið mikudagin, høvdu bert hálovandi orð um avrikini hjá honum og hinum í nevndini.

Summir tingmenn undraðust tó á býtið av landgrunninum – leiðin sunnanfyri. Edmund Joensen úr Sambandsflokkinum helt, at Føroyar høvdu fingið ein størri part, um sakin var endað við dómstólin í Haag. Hesindi og ikki í sær sjálvum nøkur trygd fyri, at úrslitið hevði verið øðrvísi. Tað kundi eisini endað við, at Føroyar fingu ein minni part.

Onnur og síðsta viðgerð í málinum, sum er lagt fram til samtyktar, verður í dag.

Úrslitið av tryggingarvirksemi niður í ein triðing

Hóast Tryggingarfelagið Føroyar hevði eitt úrslit áðrenn skatt í fjør upp á heili 87,5 mió. kr. so stava bert 12,5 prosent av úrslitinum frá sjálvum tryggingarvirkseminum meðan restin stavar frá fíggjarvirksemi

ELI GUTTESEN

Kappingin á føroyska tryggingarmarknaðinum hevur longu sett síni spor.

Ein avleiðing av hesum er, at úrslitið av tryggingaravirkseminum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar er minkað nærum niður í ein triðing.

Úrslitið, sum í 1997 var 31,4 mió. kr. tá óvanligt ikki er tikið við, var bert 11,9 mió. kr. í fjør og skulu vit heilt aftur til kreppuárið 1994 fyri at finna eitt tilsvarandi úrslit.

Minkingin upp á 19,5 mió. kr. í mun til 1997 svarar til eina lutfallsliga minking upp á heili 62 prosent.

Sostatt kann sigast, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur fingið eina heldur harða byrjan í sínum fyrsta roknskaparári undir nýggja navninum.

Men forkláringin upp á stóru afturgongdina í úrslitinum er, at 20 mió. kr. vóru avettar til sokallaða 8%-avsláttturin í fjør.

Taka vit hædd fyri hesum gjørdist úrslitið av rakstrinum í veruleikanum hálva millión betri enn undanfarna ár.

Trygging gevur bert 12,5%

Hóast talan í veruleikanum er um eitt tryggingarfelag, so er tað ikki hetta virksemið, sum gevur felagnum flestu inntøkurnar. Tað ger fíggjarvirksemi hjá felagnum harafturímóti.

Halda vit óvanligu útreiðslurnar uttanfyri fyri fyrst, so gav fíggjarvirksemi eitt avlop upp á heili 83,5 mió. kr. í fjør, og her er talan um ein vøkstur upp á 13,8 mió. kr. svarandi til 20 prosent.

Staðfestur vinningur av íløguaktivum øktist við 4 mió. kr., staðfestur vinningur av íløguaktivum hækkaði við 7,8 mió. kr., meðan rentur og vinningsbýti bert hækkaði við 0,7 mió. kr.

Leggja vit úrslitið av tryggingarvirkseminum saman við úrslitinum frá fíggjarvirkseminum gevur hetta tilsamans 95,4 mió. kr.

Úrslitið kundi verið 115,4 mió.

Hetta úrslit kundi møguliga verið 20 mió. kr. hægri og komið heilt upp á 115,4 mió. kr. um ikki felagið hevði avsett áðurnevndu 20 mió. kr. til 8%-avsláttturin í fjør.

Men eftir samanlagda úrslitið upp á 95,4 mió. kr. hevði felagið óvanligar útreiðslurnar upp á heili 7,3 mió. kr. samstundis sum aðrar útreiðslur vóru um 0,6 mió. kr. netto í fjør og tí gjørdist úrslitið áðrenn skatt 87,5 mió. kr.

Óvanligu útreiðslurnar stava frá einum serligum skannara, ið við gávubrævið er givin Landssjúkrahúsinum, men hesin skannari er tó ikki enn tikin í nýtslu.

Eginognin hækkar 41 mió.

Eftir at 26 mió. kr. eru avsettar til skatt eru sostatt bert 61,5 mió. kr. eftir av úrslitinum og henda upphædd er flutt til eginognina, sum tó ikki økist við hesi upphædd.

Orsøkin er, at 20 mió. kr. aftur her eru avsettar til samanleggingarútreiðlur.

Hetta hevur við sær, at eginognin bert er økt við 41 mió. kr. Henda var 1.030 mió. kr. við árslok 1997, men er nú 1.071 mió. kr.

Men Tryggingarfelagið hevur kortini ikki brúkt allar hesar 20 milliónirnar í samand við samanleggingina, tí 15 mió. kr. standa enn eftir í roknskapinum, men upphæddin er sum sagt ikki undir eginognini.

Verða pengarnir ikki brúktir til tað teir eru ætlaðir, verður restupphæddin flutt yvir aftur til eginognina, haðani hon upprunaliga var tikin.

Bert
1 tíma ...



...tekur tað at røkka eina av okkara nýggju farmastøðum – tað sama hvar tú ert í Danmark.

Farmastøðirnar eru allar mannaðar við serkønum fólki, ið kenna til farmaflutning til og úr Føroyum. Her svara og loysa vit allar ivaspurningar um farm og flutning. Í Hedehusene og Kolding taka vit móti farmi allan friggjadagin, og í Hanstholm líka til leygardag á middegi. Allir út- og innflytarar av farmi hava nógvar fyrimunir við landsins einastu RO-RO flutningsleið. Norröna fer avstað leygarkvøld, og mánamorgun eru vit frammi í Føroyum.

Smyril Line Cargo
Jónas Broncksgøta 35
100 Tórshavn
Tlf. 31 59 00
Fax 31 89 60

Smyril Line Cargo
Trafikhavnsgade 7
7730 Hanstholm
Tlf. 096 55 03 50
Fax 096 55 03 51

Smyril Line Cargo
Birkedam 10
6000 Kolding
Tlf. 076 30 08 55
Fax 076 30 09 55

Smyril Line Cargo
Guldalderen 6
2640 Hedehusene
Tlf. 046 59 34 98
Fax 046 59 30 34

SMYRIL LINE
TÍN SKJÓTASTA FARMALEIÐ